## HANDILSLÆRLINGUR TIL THOMAS DAM ÍTRÓTT Í HAVN

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara í Havn at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann í dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og vi FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR · NIELS FINSENSGØTA 5
POSTSMOGA 268 · 110 TÓRSHAVN · TEL 35 53 00

# Søkt verður eftir stuðli

Eiðis kommuna søkir eftir stuðli til 8 ára gamalt barn við serligum tørvi at byrja sum skjótast.

Starvið er 25 tímar um vikuna, eftir skúlatíð.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelag Føroya.

Vit leggja dent á, at tú hevur góð samstarvsevnir, ert ágrýtin og vitunarviljaður og hevur virðing og umsorgan fyri barninum og foreldur tess.

Ynskiligt er, at tú ert námsfrøðingur, tó er hetta ikki ein treyt.

Arbeiðsstaður er Spælistovan á Hvítaklettsvegi, Eiði.

Meiri fæst at vita um starvið, við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 423588 ella fart. 210588.

Umsókn við avriti av prógvi o.ø. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. august 2006, kl. 12.00 og skal sendast til:

**Eiðis kommunu**
**att: Mentanarnevndin**
**470 Eiði**

## TIL SØLU

Ford Puma 1,4 í góðum standi.
Árgang 2001, koyrt 43.000 km.
Selist bíliga

*Tel 74 81 79*

## TIL SØLU



RaðhúsTorkilsgøta 1, Hoyvík, til sølu um hóskandi boð fæst. Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvi.
Byggiár 2001.
Húsini eru í 2 hæddum, í alt 160 m2.
Í niðaru hæddini eru gongd, kamar, baðirúm, hjúnarrúm við klædnarúmi, stova og køkur í einum og grovkøkur.
Á loftinum eru 2 stór kømur, uppihaldsrúm og baðirúm við brúsu.

**Tel. 320555 eftir kl. 16.00**

## FISKIRANNSÓKNARSTOVAN

Til verkætlanina "Kanning av koralløkjum" lýsir Fiskirannsóknarstovan hervið eftir skipi, sum er minst 50 brt til støddar.
Verkætlanin snýr seg um at kanna hvar og hvussu nógv er til av korallum kring Føroyar.

Talan er um at gera undirsjóvarupptøkur á Suðuroyarbankanum og á Munkagrunninum.
Ætlanin er at byrja seinast í august mánað og halda á í 2 vikur.

Meira fæst at vita við at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna tel. 35 39 00.

Sosialurin 341800

Fiskirannsóknarstovan

# Summar tilboð

Nú er tíð at taka bátin upp á land
til botnreinsan

Vit fara nú sum nakað nýtt at taka bátar upp á Toftum. Møguleiki verður at hava atgongd til trýstreinsara.

Prísdømi 28 Fót 500,- V/MVG
Upp og niður Eingin bíðitíð

Møguleiki er eisini at gera botnsýn

Um hetta hevur tygara áhuga, so ring

**447474 ella 225105**

eisini kan sigast frá á e-mail
*sdbeding@post.olivant.fo*

**SD-BEDING**
Góðkendur glastrevjaverkstaður

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*VÁGAR/NORÐSTREYMOY*

# Sjúkrarøktarfrøðingur í Heimarøktini

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 20 tímar um vikuna í skiftandi dag- og kvøldvaktum at byrja 1. september 2006.
Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til heimabúgvandi borgarar og til búfólkini á Eldrasambýlinum. Arbeitt verður í tøttum samstarvið við aðrar fakbólkar innan skipanina

**Krøv til umsøkjarin:**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga innan primera øki
- Góð samstarvsevni og dugir væl at samskifta
- Ert fleksibul
- Ynskiligt er at umsøkjarin hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar.

Setanarøkið er Heimarøktin og Serforsorgin og tænastustaðurin er fyribils Heimarøktin í Vágum, Vestmanna og í Kvívíkar Kommunu.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran tlf. á 333249.

Umsókn saman við prógvi, og møguligum viðmælum verður at senda til :

**Heimarøktin Vágar/Norðstreymoy**
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 23. august 2006**

# Leiðari

## til Dagtilhaldið Hugnin, Sandur

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir leiðara til Dagtilhaldið Hugnin, Sandur.

Arbeiðið er 15 tímar/viku. Løn sambært sáttmála.

Starvstíðin er frá 1. september 2006 og 6 mánaðir fram.

Umsóknarfreistin er 25. august 2006.

Áhugaðir umsøkjarar skulu senda umsókn til:

**Sands kommunu**
Postboks 10
FO-210 Sandur

## Stoypiarbeiði

Fólk søkist til at stoypa platt og trappur í Leirvík, skjótast gjørligt.

***Ring og hoyr nærri á tel. 222081***